GJALDSTOVAN

# Útbjóðingarskriv

Viðvíkjandi veiting av røkt av akførum hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum

GJALDSTOVAN

# Innihald


1. Útbjóðandi stovnur ..... 3
2. Inngangur til útboðsmannagongd ..... 3
3. Útboðstilfar ..... 4
4. Praktiskar upplýsingar ..... 4
    a. Spurningar ..... 4
5. Tilboð ..... 5
    a. Tilboðsfreist og teldupostadressa til innlating av tilboði ..... 5
    b. Frágreiðing um tilboð ..... 5
    c. Samráðingar ..... 6
    d. Fyrivarni og minstukrøv ..... 6
    e. Alternativt tilboð ..... 7
    f. Freist ið tilboð skal standa við ..... 7
6. Viðgerð av innkomnum tilboðum ..... 7
7. Meting av tilboðum ..... 7
    a. Tillutanartreyt ..... 7
    b. Mannagongd í samband við meting av tilboðnum ..... 8
8. Tillutan av sáttmála og endi á útboði ..... 10

## 1. Útbjóðandi stovnur

Gjaldstovan vegna Almannaverkið

Kvíggjartún 1

160 Argir

Føroyar

Telefonnummar: +298 212910

Samskiftispersónur: Rói Mohr Jónsson

## 2. Inngangur til útboðsmannagongd

Gjaldstovan vil vegna Almannaverkið geva tykkum møguleikan at bjóða uppá røkt av akførum hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum.

Útboðið verður framt sum eitt alment útboð sambært rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum.

Tær formligu reglurnar í hesum útboði viðvíkjandi avhendan av tilboði, samskifti millum útbjóðara og tilboðsgevara og aðrar upplýsingar eru at finna í hesum útbjóðingarskrivi.

Hetta útboðið inniheldur fylgjandi stig:

1. Útinnan av tilboði: Tilboðsgevari fyrireikar sítt tilboð við støði í útboðstilfarinum, og tilboð skal vera latið inn innan ásettu tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.a. Í hesum tíðarskeiði kann tilboðsgevari fáa fleiri upplýsingar við at seta skriftligar spurningar, sbrt. pkt. 4.a.
2. Meting av tilboðum: Útbjóðari letur upp og metir, um innkomin tilboð eru í tráð við form- og minstukrøv. Eftir hetta verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreyt, sbrt. pkt. 7.a.

3. Tillutan av sáttmála: Útbjóðari tekur avgerð um tillutan av sáttmála og kunnar tilboðsgevarar um avgerðina.

## 3. Útboðstilfar

Útboðstilfarið er sett saman av:

- Hesum útbjóðingarskrivinum
- Skjøl til útbjóðingarskriv:
  - Fylgiskjal 1: Tilboðsbræv
  - Fylgiskjal 2: Trú og heiður váttan
- Uppskot til sáttmála, sum inniheldur treytirnar, ið stýra viðurskiftini millum partarnar í tí tíðarskeiði, sum sáttmálin er galdandi.
- Uppskot til fylgiskjøl A - D til sáttmálan, sum inniheldur treytirnar til veiting av røkt av akførum hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum.

Útboðstilfarið er tøkt á keypsportal.fo.

## 4. Praktiskar upplýsingar

### a. Spurningar

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skriftligar spurningar. Spurningar skulu vera á føroyskum og sendast til Róa Mohr Jónsson á:

roimohr@gjaldstovan.fo

Spurningar, ið eru settir fyri 22.09.2022, verða svaraðir í seinasta lagi 6 (seks) dagar áðrenn ásettu tilboðsfreist.

Spurningar verða svaraðir skrivliga og dulnevnt. Øll svar kunnu síggjast á keypsportal.fo í seinasta lagi 27.09.2022.

# 5. Tilboð

## a. *Tilboðsfreist og teldupostadressa til innlating av tilboði*

Tilboð skal latast inn talgilt til Róa Mohr Jónsson á Gjaldstovuni á:

roimohr@gjaldstovan.fo

Tilboð kann ikki latast inn á annan hátt.

Freistin at lata inn tilboð er:

***04.10.2022 klokkan 13.00***

Tilboð, ið verða latin inn aftaná hesa freist, verða ikki viðgjørd.

## b. *Frágreiðing um tilboð*

Eitt tilboð inniheldur hesi fylgiskjøl:

I) Eitt tilboðsbræv, Fylgiskjal 1
II) Trú og heiður váttan, Fylgiskjal 2
III) Útfylt fylgiskjøl

*Viðv. I) Tilboðsbræv*

Tilboðsgevari skal brúka *Fylgiskjal 1 - Tilboðsbræv* í samband við avhendan av tilboði.

*Viðv. II) Trú og heiður váttan*

Tilboðsgevari skal samstundis, sum boðið verður latið inn, vátta við trú og heiður, í hvønn mun viðkomandi hevur falna almanna skuld. Tilboðsgevari skal brúka *Fylgiskjal 2 - Trú og heiður váttan* í samband við avhendan av tilboði.

*Viðv. III) Útfylt fylgiskjøl*

Tilboðsgevari skal fylla út fylgjandi fylgiskjøl:

- Fylgiskjal B - Veitarans tilboð
- Fylgiskjal C - Veitarans prísir

Heitt verður á tilboðsgevara um at halda seg til skapið á útboðstilfarinum, tá ið fylgiskjøl verða fylt út. Tilboðsgevari skal sostatt ikki broyta skapið á fylgiskjølum, tá ið tilboð verður latið inn.

Tilboð skal latast inn á føroyskum.

## c. Samráðingar

Útbjóðari hevur ikki møguleika fyri at samráðast við tilboðsgevarar um innkomin tilboð. Útbjóðari kann tó venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at útgreina innihaldið í tilboðnum, tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tað verða sostatt ongar sáttmála- ella príssamráðingar í samband við hetta útboðið, og tískil verður heitt á tilboðsgevara um at fyrireika tilboðið soleiðis, at sáttmálin kann undirskrivast uttan undanfarnar samráðingar partarnar í millum.

## d. Fyrivarni og minstukrøv

Tilboð við fyrivarni kunnu verða burturvíst. Tilboðsgevari kann tískil ikki hava fyrivarni fyri

minstukrøvum í útboðstilfarinum. Um tilboðsgevari hinvegin ikki kann lúka góðskukrøv, verður hetta ikki mett sum fyrivarni.

### e. *Alternativt tilboð*

Alternativ tilboð verða burturvíst.

### f. *Freist ið tilboð skal standa við*

Tilboð skal standa við í 30 arbeiðsdagar, roknað frá ásettu tilboðsfreist.

## 6. Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.a. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at útgreina innihald í tilboðunum. At enda fer útbjóðari at meta um innkomin tilboð í tráð við ásettu tillutanartreyt, sbrt. pkt. 7.a.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina stutta frágreiðing um avgerðina, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

## 7. Meting av tilboðum

### a. *Tillutanartreyt*

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku. Gjaldstovan brúkar vegna Almannaverkið fylgjandi undirtillutanartreytir:

1. Prísur 80 %
2. Góðska 20 %

Prosenttølini omanfyri umboða vektina á teimum báðum undirtillutanartreytunum í samband við metingina av tilboðunum. Undirtillutanartreytirnar eru lýstar meira nágreiniliga niðanfyri.

## *b. Mannagongd í samband við meting av tilboðum*

I) Karakterstigi

Innkomin tilboð fáa karakter eftir fylgjandi karakterstiga:

| **Karakterur** | **Týdningur** |
|---|---|
| 5 | **Avbera gott**<br>Verður givið tilboðum við eginleikum ella góðsku, sum betra um loysnina, ella á annan hátt hava við sær sera stóra virðisøking / sera góður prísur. |
| 4 | **Gott**<br>Verður givið tilboðum við eginleikum ella góðsku, sum betra um loysnina, ella á annan hátt hava við sær góða virðisøking / góður prísur. |
| 3 | **Rímiligt - sum væntað**<br>Verður givið tilboðum, sum lúka tørvin ella eru við til at loysa uppgávuna / prísurin er hvørki góður ella ivingarsamur. |
| 2 | **Heldur ófullfíggjað**<br>Verður givið tilboðum, sum hava ávísar manglar í mun til at lúka tørvin. Uppgávan kann loysast við ávísum stríði / heldur ivingarsamur prísur. |
| 1 | **Ófullfíggjað**<br>Verður givið tilboðum, sum hava manglar í mun til at lúka tørvin. Uppgávan kann loysast, men til eitt støði sum akkurát kann góðtakast / ivingarsamur prísur. |

II) Prísur, hvussu verður prísurin útroknaður

Útbjóðari roknar út eina kostnaðarmeting fyri hvørt tilboð. Henda kostnaðarmeting verður roknað út sambært vegleiðing í *Fylgiskjal C - Veitarans prísir*.

III) Karakterur fyri tilboðsprísin

Øll tilboð, sum lúka form- og minstukrøv, fáa ein karakter fyri prísin frá 1 - 5.

Tilboðið við lægstu kostnaðarmeting fær karakterin 5. Øll onnur tilboð verða sett á ein linjurættan karakterstiga. Tilboð við einari kostnaðarmeting, sum eru 15 % ella meira omanfyri lægstu kostnaðarmeting, fáa karakterin 1 (sum víst í ritmynd niðanfyri).




IV) Karakterur fyri góðsku

Øll tilboð, sum lúka form- og minstukrøv fáa ein karakter fyri góðsku frá 1 – 5.

Tilboðsgevari kann sjálvboðið bjóða aðrar tænastur, sbrt. krav. nr. 12 í *Fylgiskjal A - Kravfesting*.

Fyri aðrar tænastur, sum tilboðsgevari sjálvboðið bjóðar, gevur útbjóðari ein karakter fyri góðsku í mun til væntaðu virðisøking í tí tíðarskeiði, ið sáttmálin er galdandi. Sannlíkindini fyri, at tænasturnar verða nýttar í tí tíðarskeiði, ið sáttmálin er galdandi, verða partur av metingini av góðsku fyri aðrar tænastur.

V) Samla meting

Tá ið tilboðið er mett sambært undirtillutanartreytunum, verður ein samla meting framd, sum er grundað á karakterirnar, sum eru givnir fyri undirtillutanartreytirnar og vektina av teimum.

Sáttmálin verður tillutaður tilboðnum, ið hevur hægsta samlaða karakterin.

## 8. Tillutan av sáttmála og endi á útboði

Útbjóðari tekur avgerð um at tilluta sáttmálan, tá ið útbjóðari hevur gjørt av, hvat er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku.

Útbjóðari er ikki bundin av at taka av tilboðnum, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku, og treytar sær rættin til at strika útboðið.

Sjálvt um sáttmálin verður tillutaður, eru tilboðsgevarar bundnir av sínum tilboði, til útbjóðari hevur undirskrivað sáttmálan, ella ásetta tíðarskeiðið í pkt. 5.f er av.

Útreiðslur, sum tilboðsgevarar hava í samband við hetta útboð, eru óviðkomandi fyri útbjóðara. Hetta er eisini galdandi, um útbjóðari verður noyddur at strika útboðið.

| **Virksemi** | **Dagfesting, kl.** |
|---|---|
| Freist at senda inn spurningar, sbrt. pkt. 4.a. | 23.09.2022 |
| **Tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.a.** | 04.10.2022 klokkan 13.00 |
| Væntandi tillutan av sáttmála | Miðjan oktobur |
| Væntandi undirskrift av sáttmála | Miðjan oktobur |

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Rói Mohr Jónsson
Fulltrúi / Procurement administrator
Gjaldstovan / Keyp Landsins